# planet.fo

Lagt til rættis: Barbara Holm barbara@sosialurin.fo



# Deiggj góða móttøku í Finnlandi

Føroyski bólkurin Deiggj vitjar í hesum døgum í Finnlandi. Umframt at framføra sjálvir, so hava menninir í Deiggj eisini verið á sangskrivaraskeiði.

- Vit hava fingið sera góða móttøku í Finnlandi, og vónandi verður móttøkan eins góð til komandi konsertirnar, sigur Fróði Vestergaard, partur av Deiggj manningini.

Bólkurin hevur higartil havt tvær konsertir, og hóskvøldið verður triðja konsertin, har gamli Heep trummusláarin Lee Kerslake spælir nøkur løg saman við Deiggj.





**Gevandi sangskrivaraskeið**

Manningin í Deiggj hevur vitjað í Finnlandi í okkurt um eina viku, og umframt at framføra, so hava tónleikararnir í Deiggj eisini verið á einum sangskrivaraskeiði við Ken Hensley.

- Tað var eitt sera gevandi og áhugavert skeið, og eg haldi, at vit lærdu nógv av Ken Hensley, sigur Fróði Vestergaard.

Deiggj koma aftur á klettarnar mánakvøldið.

# Tónleikahandil á planet.fo

Í gjár lat nýggjur tónleikahandil upp á shop.planet.fo.

Avtala er gjørd við danska felagið Basepoint Media, sum letur teknisku skipanina til handilin, um samstarv. Í handlinum er møguligt at taka niður (downloada) einstøk løg ella heilar útgávur. Tað eru á leið 3 milliónir løg í handlinum, og fleiri koma afturat hvørja viku.

- Vit hava roynt at fingið so nógvan føroyskan tónleik sum møguligt við í handilin. Vit hava havt gott samstarv við Tutl um hetta, og longu nú eru eini 300 føroyskar fløgur í tónleikahandlinum á planet.fo. Málið hjá okkum er at allur føroyskur tónleikur skal verða at fáa í okkara tónleikahandli, sigur Óli á Deild Olsen, leiðari á FT Online.

- Vit vóna at føroyingar, bæði her og uttanlands, fara at taka væl ímóti hesum tiltaki. Hetta er fyrstu ferð, at nakar er farin eftir miðvíst, at savna føroyskan tónleik til niðurtøku á internetinum, sigur Óli á Deild.

Vitja handilin á ***http://shop.planet.fo***

